## Spildurnýggj miðverja helt tætt

**Herbert í Lon Jacobsen fegnast um, at tað í tveimum teimum fyrstu royndunum í samanspælinum við Bárð H. Joensen hevur eydnast at hildið tætt**

**B36**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í B36 leguni var lagið avbera gott leygarkvøldið. Hóast fleiri at teimum, sum verða roknaðir at vera stuðulsspælarar, ikki høvdu verið við í Klaksvík og í steypadystinum á Toftum hósdagin, so hevði tað eydnast báðu ferðirnar at vinna og samstundis at halda mótstøðumonnunum at gera mál.

– Hetta eru fyrstu ferðirnar yvirhøvur, at eg og Bárður H. Joensen hava spælt saman í miðverjuni. Tað gekk væl, og tú kanst ætla, at sigurin í Klaksvík smakkaði serliga søtur, nú venjarin aftur hevur proklamera, at teir fara at vinna FM í ár, staðfestir Herbert í Lon Jacobsen, sum fegnast um, at hann var førur fyri at spæla:

– Eg spældi 90 minuttir hósdagin, og aftur 90 minuttir leygardagin. Hetta er fyrsta ferðin, at eg havi spælt fulla tíð á besta liðnum síðani í august í fjør, tá ið eg breyt beinið. Orsaka av trupulleika við herðablaðnum var eg burturi frá venjing í tríggjar vikur, og eg hevði bara vant tíggju dagar undan hósdegnum. Men tað hevur gingið fint hjá okkum, og nú eru vit spentir at fara norður á Mølina, sigur miðverjin, sum heldur, at B36 átti allan 1. hálvleik, og at teir duttu óneyðuga langt aftur í 2. hálvleiki.

– Serliga hugaligt var tað at síggja, hvussu væl ungu menninir stóðu seg, nú tað rættuliga varð roknað við teimum.

## Holst tapti toppdystin



Christian Holst Lamhauge og liðfelagarnir í Lyngby taptu toppdystin í næstbestu donsku fótbóltsdeildini sunnudagin. Lyngby spældi á heimavølli ímóti Vejle, og við einum sigri kundi Lyngby toga seg upp á javnt við Vejle á næstfremsta plássinum. Men tað gjørdist Vejle, sum vann dystin 4-2. Vejle legði seg á odda 2-0, men so javnaði Lyngby til 2-2 fyri hálvleik. Lyngby gjørdi sjálvmál ein minutt seinni, og móti endanum av dystinum økti Vejle til 4-2. Christian Holst Lamhauge spældi allan dystin í álopinum hjá Lyngby, men hann skoraði ikki hesaferð.

## Eingin Andrew í dramatiskum dysti

Fremad Amager stóð fyri einum ordans avriki í donsku 1. deild í gjár. Felagið, har Andrew av Fløtum er ein av spælarunum, spældi á heimavølli ímóti Lolland Falster Alliancen (LFA), og tað gekk illa í hond stóran part av dystinum. LFA kom á odda 2-0 í fyrra hálvleiki, og so sá einki út hjá Fremad Amager. Men felagið hjá Andrew gjørdi eitt rimmar comeback, tí frá 55. minutti og 13 minuttir fram skoraði teir tríggjar ferðir. Dysturin endaði tí 3-2 til Fremad Amager. Andrew av Fløtum, sum hevur skaða at dragast við, var ikki á vøllinum í hesum dystinum.

KÍ-B36 0-1 (0-1):

# B36 setti KÍ upp á pláss

*KÍ*

*B36*

**Eingin ivi var um, at norðoyagestirnir vóru væl betri fyri, enn heimamenninir, sum løgdu rygg til fyrsta tapið í ár**

**FÓTBÓLTUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyrsta triðingin av hesum kappingarárinum megnaði KÍ hvørja ferð at fara av vøllinum við í hvussu so er einum stigi. Tá ið sjøtul leygarkvøldið varð settur á næsta triðingin av 2006 kappingarárinum, gekk tað ikki longur hjá klaksvíkingum.

Heimamenninir tóktust tungir og uttan stóra íblásturin, sum higartil hevur borið so mikið at stigum við sær, at teir undan leygarkvøldinum vóru á triðja plássi.

Bæði KÍ og B36 spældu fjórðingsfinalu í steypakappingini hósdagin. Tað kundi sæð út sum um, at klaksvíkingar vóru væl meiri tyngdir av tí stríðnum, enn gestirnir vóru tað. Spurningurin er so, um tað var hálvi tímin, sum teir vóru noyddir at brúka eyka fyri at vinna rættin at halda fram í steypakappingini, sum sat serliga tungur í kroppunum.

### Langt og høgt

Norðoyastevnu konseptið hjá KÍ var, sum tað hevur verið higartil. Tað gongur út upp á, at bólturin – uttan mun til hvar hann verður vunnin á vøllinum – beinanvegin skal lyftast so langt fram á vøllin, sum tað ber til. Setningurin er so hjá fremsta manninum at vinna bóltin og at stýra honum út í annað borðið. Uppgávan hjá miðvallarunum er í uppspælinum avmarkað til við høvdinum at snitta bóltin longri fram á vøllin og til at vinna returbóltarnar.

Tá ið konseptið ber mál og stig og viðhvørt sigrar við sær, er tað eingin orsøk at umhugsa broytingar. Tá ið tað hilnast so illa, sum tað gjørdi leygarkvøldið, sigur tað seg sjálvt, at fokus verður sett á. Ikki minst tá ið fremsti maðurin tóktist so mikið skaddur, at hann ikki var førur fyri at spæla!

Í hátalaranum varð boðað frá, at flogbóltslandsdystur skuldi vera í ítróttarhøllini í Klaksvík seinnapartin sunnudagin. Soleiðis sum heimaliðið royndi at fáa bóltin at ferðast leygarkvøldið, kundi tað sæð út sum um, at teir vóru undir ávirkan av flogbóltinum. Tað var høgt, men mótsatt flogbóltinum einki hugflog, og eingin roynd varð gjørd at broyta uppstillingina, fyrrenn vanliga leiktíðin var farin.

KÍ hevði í 1. hálvleiki ein møguleika at fáa mál. Í 22. minutti endaði álop í vinstru við innleggi, sum Harley Bertholdsen var ov stuttur fram til. Eftir steðgin høvdu Hjalgrím Elttør og Heðin á Lakjuni, sum royndu at arbeiða nógv, onkra góða skotroynd, og í einstøkum førum kundu deyðbóltsstøður borið mál við sær, men stútarnir fóru í tveimum førum dygst við síðuna av.

Kristoffur Jacobsen, sum hóast tvey mál hósdagin noyddist at vera á vongverjanum í 1. hálvleiki, var fram móti dystarenda tætt við.

### Skilagóðir gestir

B36 hevði lisið upp á lektiuna, áðrenn teir fóru á Norðoyastevnu. Verjan helt seg aftarlaga, so einki rúm var aftanfyri teir hjá klaksvíkingunum at leggja langar sendingar at renna eftir í.

Í 1. hálvleiki dusaðu B36arnir – og ikki minst Santos - sær í stóru víddunum, sum teir fingu at spæla í, tí KÍ verjan lá so aftarlaga – ivaleyst tí teir ikki vildu fara at kapprenna við Sylla, Obi og Símun. Liðformaðurin, Klæmint Matras, hevði nógvar nærdystir við Símun Joensen og Oddmar á Lakjuni, og lættbeintu Jóhan V. Gunnarsson og Hanus Thorleifsson megnaðu ofta at leggja góðar sendingar til Sylla Ahmed og hinar í fremstu røð.

Sylla átti at havt fingið mál í 18. minutti, tá ið hann gjørdist púra blankur mitt fyri, men jánkasliga skotið fór við síðuna av. Nógv tað mesta gekk fyri seg á KÍ hálvuni í 1. hálvleiki. B36 hevði álop í báðum borðum, og málið spókti leingi. Í 35. minutti blokeraði Høgni Madsen, tá ið Sylla hevði fína roynd, og í 38. minutti skoraði Sylla, eftir langt útspark frá Magnusi Poulsen, sum var tryggur avloysari hjá Jákupi Mikkelsen. Bólturin varð snittaður í vinstra borð, Obi sneiddi seg leysan, kontra kom á innleggið, og so var Sylla blankur í brotsteiginum og mitt fyri.

Eftir steðgin og serliga sum 2. hálvleikur leið var luturin hjá B36 at verja, og tá ið KÍ smátt um smátt flutti aftastu menninir longri fram, vóru fremstu menninir hjá B36 nakrar ferðir í góðum støðum at gera mál. Serliga Sylla hevði gyltan møguleika, men liðfelagarnir mundu ivaleyst fyrigeva honum, at hann ikki økti um leiðsluna. Tað vísti seg, at eitt mál var nóg mikið at seta KÍ upp á pláss við!



*Kvika B36-álopið legði stórt trýst á KÍ-verjuna fyrstu trý korterini, og tað var eisini uppiborið, tá Sylla stutt fyri hálvleik skoraði einsamalla málið í dystinum* *Mynd: Álvur*

# Vaknaðu ov seint

**Verjuálitið hjá KÍ staðfestir, at tað nú fleiri ferðir hevur verið tung mótbrekka, tí mótstøðuliðið leggur seg á odda**

**KÍ**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

KÍ stendur seg sjáldan væl í landskappingardystunum á Norðoyastevnu. Tað var sama lagið hesa ferð, og Atli Danielsen, sum í yvirtíðini varð fluttur úr aftastu ódnini og í fremstu røð, staðfestir, at hetta var ikki gott:

– Vit hvørki spæla væl ella megna at seta teir undir trýstið, sum vit ofta hava megnað at leggja fyrr í ár. Í 1. hálvleiki vóru vit ov aftarlaga. Tað bar við sær, at B36 fekk ov nógv pláss at spæla á. Tað er altíð vandamikið at renna aftaná mótstøðumonnunum. Tað gjørdu vit hesa ferð.

Tað er vorðið vani, at mótstøðuliðið leggur seg á odda?

– Á Eiði komu hinir framum. Móti GÍ í landskappingini mistu vit leiðsluna í síðstu sekundunum, og móti HB í landskappingin og móti GÍ í steypakappingini fóru vit frá 1-0 og til 1-2, men tá megnaðu vit at koma afturíaftur. Felags fyri fleiri av hesum dystunum hevur verið, at vit koma ikki nóg skjótt í gongd. Soleiðis var tað eisini hesa ferð, og hetta mugu vit gera nakað við, heldur Atli Danielsen hjá KÍ.

Í Klaksvík bíða tey nú eftir Christian Lundberg. Spurningurin er, hvat teir skulu gera við hann, og um hann skal standa fyri álopsspælinum, ella um fleiri skulu taka lut í spælinum longri frammi á vøllinum, enn tað hevur víst seg tær seinastu ferðirnar.